# Løgtingslóg

**um**

**broyting í løgtingslóg um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð**
(Minka landsbankanevndina, ásetingar um landsins gjaldføri, avtaka stovnsfæið)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2 verður orðað soleiðis:
"**§ 2.** Landsbanki Føroya er undir leiðslu av eini nevnd og einum stjóra.
*Stk. 2.* Nevndin er skipað við 5 limum, sum landsstýrismaðurin velur í eitt 3 ára tíðarskeið og kunnu teir veljast aftur í mesta lagi 4 ferðir. Tá limur ikki hevur sitið í nevndini í eitt 3 ára skeið, kann hann veljast av nýggjum. Landsstýrismaðurin setur nevndarlimirnar eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Landsstýrismaðurin velur formannin.
*Stk. 3.* Í minsta lagi 3 limir skulu vera búskaparfrøðingar við kandidatútbúgving frá hægri lærustovni. Nevndarlimirnir skulu hava fakligar førleikar innan eitt ella fleiri av hesum førleikaøkjum:
1) Búskaparfrøði.
2) Fígging og kredittmeting.
3) Føroyskt vinnulív.
4) Serligt innlit í føroyska fíggjargeiran ella búskapin í Føroyum.

*Stk. 4.* Nevndarlimirnir skulu samanlagt fevna um allar førleikarnar nevndir í stk. 3, nr. 1-4.
*Stk. 5.* Persónar, ið javnan kunnu væntast at verða ógegnigir í málsviðgerðini hjá nevndini eftir reglunum í kapitli 2 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg, kunnu ikki vera limir í nevndini.
*Stk. 6.* Limirnir í nevndini kunnu ikki starvast í fyrisitingini hjá landsstýrisfólkunum ella Landsbanka Føroya."

**2.** Í § 11 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum í stk. 1 fram til at næsta landskassalánið fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niður um 13% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári."
Stk. 2-4 verða eftir hetta stk. 3-5.

**3.** § 17 verður strikað.

**4.** § 18, stk. 2 og 3 verða strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 29. apríl 2021 við 14-0-12 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 29. apríl 2021

stjóri

lm. nr. 98/2020